FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Ársfrágreiðing 2012

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

J. C. Svabos gøta 14 • Box 272
110 Tórshavn • Faroe Islands • www.setur.fo

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ........ 2
Fróðskaparsetur Føroya 2012 ........ 3
Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi ........ 5
Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi ........ 7
Útbúgvingar og lesandi ........ 9
Fíggjarviðurskifti ........ 11
Mál fyri 2013 og strategi ........ 12
Vísindaligar útgávur ........ 14
Ph.d. verkætlanir á Fróðskaparsetrinum í 2012 ........ 20

# Inngangur

Elsta universitetið í Evropa er í Bologna. Tá ið universitetið fylti 900 ár í 1988, varð stig tikið til at lýsa *Magna Charta Universitatum* (www.magna-charta.org) fyri universitet. Her verður staðfest, at universitet eru sjálvstýrandi stovnar, ið virka óheft av politiskari, økonomiskari og ideologiskari makt. Víst verður á ovurstóra týdningin av at verja granskingarfrælsið og at gransking og undirvísing eru óloysiliga heft. Universitet eru týdningarmiklir mentanarberar og skulu taka frástøðu frá intoleransu, skulu eggja til samrøðu og ikki lata sítt virksemi ávirkast av landafrøðiligum ella politiskum mørkum. Í 1999 varð sonevnda Bologna-yvirlýsingin samtykt. Hon bindur limalondini til at skipa útbúgvingar sínar eftir einum leisti, sum ger tað møguligt at samanbera útbúgvingar og prógv millum lond. Tó skulu national áhugamál og sereyðkenni í útbúgvingarskipanini varðveitast.

Fróðskaparsetur Føroya virkar við heimild í lóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya og við seinni broytingum við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012. Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli og Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya vórðu við lógini frá 2008 løgd saman í ein stovn undir heitinum Fróðskaparsetur Føroya. Ætlanin við lógini er m.a. at skipa hægri útbúgvingar í Føroyum eftir einum felags leisti, sum uppfyllir ásetingarnar í Bologna-yvirlýsingini.

Lykilin til, at okkara universitet kann mennast, er at vit leggja dent á, at Setrið hevur altjóða støði og at útbúgvingarnar eru granskingargrundaðar. Í samband við, at ein føroyskur granskingarpolitikkur skal setast í verk, hevur Fróðskaparsetrið víst á eina røð av evnum, ið hava stóran týdning fyri Føroyar, eins og tey eru sera viðkomandi í altjóða høpi. Setrið leggur dent á gransking, ið hevur týdning fyri burðardygga samfelagsmenning. Hvat skal til, fyri at hesum samfelagnum er lív lagað um 50 ella 100 ár?

Til tess at hava eitt burðardygt samfelag, har ungar, vælútbúnar familjur vilja búseta seg, má samfelagið gerast enn meiri áhugavert og kappingarført. Langtíðarætlanir mugu leggjast fyri eina røð av týðandi økjum, til dømis, hvussu skapa vit virðilig og kappingarfør lívskor fyri okkara borgarar, hvussu ynskja vit, at okkara framtíðar arbeiðsmarknaður skal vera, hvar fáa vit orku frá í framtíðini og hvussu gagnnýta vit okkara tilfeingi á besta hátt?

Hesir spurningar eru í dag tvinnaðir saman og kunnu ikki loysast hvør sær. Samfeløg og vinnulív í vøkstri skilja, at framtíðin í enn størri mun krevur fjøltáttað samstarv millum fak- og samfelagsbólkar og at høvuðsdentur má leggjast á at fremja hetta gjøgnum gransking, útbúgving og nýskapan.

# Fróðskaparsetur Føroya 2012

## Setrið má vera viðkomandi fyri føroyska samfelagið

Fróðskaparsetur Føroya setur sær høg mál. Miðvís gransking og góð útbúgvingartilboð eru høvuðsmálini hjá Setrinum, og arbeitt verður av øllum alvi at menna góðar og fjølbroyttar universitetsútbúgvingar, kjølfestar í føroyska samfelagnum og sum lúka altjóða krøv. Í 2012 varð tikið upp til 9 ymiskar útbúgvingar og 213 lesandi byrjaðu lestur. Útbúgvingarnar verða javnan endurskoðaðar, og nú verða námsætlanir og skeiðslýsingar skipaðar í samsvar við krøvini sett í Bologna-yvirlýsingini.

Til at røkka nýggjum og hægri málum er neyðugt at knýta samstarvsbond til onnur universitet og granskingarstovnar, eins og Setrið fyrireikar seg til eftirmetingar.

## Eitt merkisár

2012 var á fleiri mótum eitt merkisár fyri Fróðskaparsetur Føroya. Nýggjur bygnaður við tveimum megindeildum varð settur í verk. Tær eru:

- Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi
- Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi

Um heystið skifti Læraraskúlin heiti og eitur nú Námsvísindadeildin (NÁD). Sjúkrarøktarfrøðiskúlin skifti seinni heiti til Sjúkrarøktarfrøðideildin (SFD).

Nýggi bygnaðurin er lýstur í myndini niðanfyri:



1. mars 2012 vóru dekanar settir á megindeildunum. Malan Marnersdóttir, professari í bókmentum, varð sett dekanur fyri Megindeildina fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi, og Hans Pauli Joensen, lektari í alisfrøði, varð settur dekanur fyri Megindeildina fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi.

Í eini eitt árs skiftistíð vóru deildarleiðarar, sum vístu til dekanarnar, settir á teimum fimm deildunum at skipa yvirgongdina frá gamla til nýggja bygnaðin. Nýggi bygnaðurin ber eisini boð um nýggj granskingarøki og nýggjar útbúgvingar.

Í mai 2012 varð Jørgen Meitilberg settur sum fyrisitingarstjóri.

## Stýrisval

Við ársenda 2012 var stýrisval. Mentamálaráðharrin tilnevnir fýra stýrislimir, starvsfólk á Setrinum velja tvey umboð í stýrið og tey lesandi velja eitt umboð.

Tvey nýggj starvsfólkavald umboð vórðu vald, ávikavist Gestur Hovgaard, lektari á Søgu- og Samfelagsdeildini, og Sára Joensen, skrivari á Føroyamálsdeildini, sum tóku sæti í stýrinum fyri Ásu Róin og Winny í Pætursastovu, sum fóru úr stýrinum. Fyri tey lesandi varð Birna Gaard vald í stýrið í staðin fyri Sunnivu Klæmintsdóttir Olsen, sum fór úr stýrinum.

Landsstýrissmaðurin í mentamálum tilnevndi somu fýra stýrislimir til eitt nýtt 4 ára skeið. Hesi eru: Herálvur Joensen, Jan Mortensen, Juanna Schröter Joensen og Tove Bull.

# Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi

Á Megindeildini fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi eru tríggjar deildir: Føroyamálsdeildin, Søgu- og samfelagsdeildin og Námsvísindadeildin.

Lesandi á megindeildini vóru í 2012 innskrivað til seks bachelorútbúgvingar og eina masterútbúgving. Harumframt er vaksandi tal av studentum, ið ganga til stakgreinalestur. Føroyamálsdeildin og Søgu- og samfelagsdeildin eru vísindaligar útbúgvingardeildir, har vísindastarvsfólkini granska og undirvísa helvt um helvt. Á Námsvísindadeildini er ætlanin at fáa meira gransking til vegar um námsfrøðilig og undirvísingarfrøðilig viðurskifti í Føroyum.

Virksemið á Søgu- og samfelagsdeildini varð økt aftur í 2010, eftir stóru sparingarnar árið fyri. 2012 var triðja árið á rað, at nýggj lesandi vórðu tikin upp á deildini. Tað hevur gjørt, at lesandi eru á øllum árgangum í senn, og at nógv undirvísingarvirksemi er.

Í 2012 var farið undir at fyrireika eitt felags norðurlendskt masternám, sum seinni hevur fingið heitið “West Nordic Studies, Governance and Sustainable Management”. Eftir ætlan byrjar námið í 2015. Í felags masternáminum luttaka Fróðskaparsetrið, Háskóli Íslands, Háskólinn á Akureyri, Høgskolen í Bodø og Ilisimatusarfik í Grønlandi. Fígging til fyrireiking av náminum hevur Norðurlendska ráðharraráðið játtað, universitetini bera sjálvi raksturin.

## Gransking á megindeildini

### *Søgu- og samfelagsgransking*

"Burðardygg samfelagsmenning í 21. øld - at stýra tí óstýriliga" er felagsheiti fyri granskingina á Søgu- og samfelagsdeildini. Tað hevur støði í tí veruleika, at allur heimurin er í holt við eina veldiga, globala transformasjón, har tað, sum var nýggjur veruleiki í gjár, longu í dag er umskapað aftur. Tí er yvirskriftin “at stýra tí óstýriliga”.

Á Søgu- og samfelagsdeildini starvast vísindastarvsfólk í søgu og lóg, búskaparfrøði og samfelagsvísindum. Dentur verður lagdur á tvørvísindaliga og praksisorienteraða gransking. Á heysti 2012 byrjaði ein granskingarverkætlan um sosio-økonomiskar broytingar í 1800-talinum. Talan er um eina trý ára granskingarverkætlan. Tað er Granskingarráðið, sum fíggjar verkætlanina. Til tess at tryggja opinleika og nýskapan samstarvar deildin við onnur universitet og mentanarstovnar, eins og við fakøki innan- og uttansetur.

### *Bókmenta- og málgransking*

Eingin stovnur í heiminum hevur føroyskar bókmentir og føroyskt mál sum høvuðsstarv uttan Føroyamálsdeildin. Granskingarøkini eru fjølbroytt. Mál í heildum verður granskað í munnmentum og bókmentum. Staklutir í føroyskum koma undir sjóneykuna í evnum sum setningafrøði, málvariatión og tvímæli; staðar- og fólkanøvn og orðabókafrøði. Eitt nú verður móðurmálsorðabókin dagførd á Føroyamálsdeildini. Harafturat verður arbeitt við at talgilda orðasavnið og onnur søvn á deildini. Grafiska arbeiðið til ein almennan brúkaraportal er gjørt.

Tríggjar ph.d.-verkætlanir høvdu sæti á Føroyamálsdeildini í 2012. Ein er staðarnavnafrøðilig og viðger gøtunøvn. Í henni verður spurt, hvat ger, at støð fáa nøvn, og at tey fáa júst tey nøvnini, ið tey hava? Nýggju gøtunøvnini á bygd verða samanborin við gøtunøvnini í Havn og Klaksvík og við tey óoffisiellu gøtunøvnini. Ein onnur ph.d.-verkætlan kannar sambandið millum málmenningina, t.d. orðanøgd og málfatan, og hvussu væl børn seinni duga at lesa. Tann triðja granskar ritverkið hjá Kristiani Osvaldi Viderø.

*Føroysk bókmentasøga* verður skrivað á Føroyamálsdeildini. Hon byggir á gransking og á bókmentamenningina í heild, listfrøðiliga og søguliga. Fyrsta bind, sum umfataði tíðarskeiðið frá 17. øld til umleið 1900, kom út í 2011. Nú verður arbeitt við øðrum bindi, sum fevnir um bókmentir frá umleið 1900 til 1960. Verkætlanin strembar eftir at greiða frá søguni hjá føroyskum bókmentum við at seta menningina av tekstsløgum og listfrøðiligum eyðkennum annars inn í bókmentasøguligt og bókmentafrøðiligt høpi. Viðgerðin av teimum ymsu rákunum, tíðarskeiðunum og høvundunum byggir á teir ítøkiligu tekstirnar og hevur fyrilit fyri eldri viðgerðum, støða verður tikin til tær og bygt verður á tær.

## Námsfrøðilig og undirvísingarfrøðilig gransking

Á heystið 2012 byrjaði ein umfatandi granskingarverkætlan á Námsvísindadeildini í samstarvi við Kennaradeildina á Háskóla Íslands um Undirvísing og læring í føroyska fólkaskúlanum. Granskingarverkætlanin kannar hugburðin til læring hjá næmingunum. M.a. verður hugt at, hvussu næmingatillagaða læringin eydnast í skúlunum. Høvuðsspurningarnir eru: Hvørja áskoðan hava lærarar og næmingar á læring næminganna, og hvørjar læringarhættir halda tey, hóska best til skúlan í dag? Hvussu samsvara hesar áskoðanir við almenna politikkin viðvíkjandi undirvísing og læring?

Ein ph.d.-verkætlan var á NÁD, ið kallast Málslig menning og lesimenning/undirvísing hjá føroyskum børnum. Harafturat varð kanning gjørd av tí, sum nýútbúnir lærarar, ið fingu prógv frá 2007 til 2011, hildu um útbúgvingina. Í 2012 varð eisini farið undir eina kanning, sum skal lýsa, hvussu væl linjufakini hjá lærarunum í fólkaskúlanum verða gagnnýtt.

# Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi

Á Megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi eru tvær deildir: Náttúruvísindadeildin og Sjúkrarøktarfrøðideildin.

Sjúkrarøktarfrøðideildin bjóðar 4 ára útbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði. Fýra flokkar við tilsamans 89 lesandi vóru á sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini í 2012.

Ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði varð eisini bjóðað út í 2012. Ískoytisútbúgvingin tók eitt hálvt ár og var skipað í tríggjar eindir: Vísindaástøði og granskingarháttalag, Valfrí eind og Bachelorritgerð.

Í 2012 vóru tríggjar bachelorútbúgvingar í gongd á Náttúruvísindadeildini: KT-verkfrøði, Lívfrøði og Jarð- & havfrøði. Samstarvsavtala er við Mittuniversitetet í Svøríki um, at lesandi í KT-verkfrøði kunnu taka skeið hjá Mittuniversitet umvegis fjarlestur sum part av síni útbúgving á Setrinum. Eitt innleiðandi arbeiði varð gjørt fyri at skipa útbúgvingarnar eftir Bolognaleistinum.

Í 2012 vórðu fyrireikingar gjørdar til at umskipa útbúgvingina í Jarð- og havfrøði til eina nýggja bachelorútbúgving í Orku- og umhvørvisverkfrøði. Innleiðandi samstarv varð fingið í lag við Danmarks Tekniske Universitet (DTU) og Háskóla Íslands. Miðað verður eftir, at tey lesandi kunnu taka ein part av útbúgvingini (t.d. hálvt ár) á útlendska universitetinum. Í fyrireikingunum verður dentur lagdur á, at tey lesandi eftir lokna útbúgving skulu kunna halda fram til kandidatútbúgvingar á útlendskum universitetum.

Náttúruvísindadeildin er í samstarvi við Bergens Universitet, Århus Universitet og Háskóla Íslands við til at bjóða eina felags norðurlendska 2 ára masterútbúgving sum kallast “Joint Nordic Master's Programme in Marine Ecosystems and Climate”. Tað er ein útbúgving fyri lesandi, sum hava sína grundútbúgving innan lívfrøðiliga ella alisfrøðiliga havfrøði, og hava áhuga fyri tvørfakligum, havfrøðiligum avbjóðingum.

## Gransking á megindeildini

Áðrenn Sjúkrarøktarfrøðiskúlin bleiv partur av Fróðskaparsetrinum, var gransking ikki ein partur av arbeiðinum hjá undirvísarunum. Arbeitt verður við at raðfesta, hvørji granskingarøki deildin frameftir vil arbeiða við.

Í 2012 var granskingarverkætlanin “Ageing in the Faroe Islands. The construction of old age and the experience of ageing” í gongd á deildini. Verkætlanin er skipað sum ph.d. verkætlan við Lunds Universitet. Tað er Ása Róin, undirvísari á deildini, ið arbeiðir við verkætlanini.

Í 2012 varð arbeitt víðari við gransking av fyribrigdinum “Vón” við støði í ph.d. verkætlanini hjá Kristionnu Hammer, lektara, við heitinum “Portraying hope. A study among women newly diagnosed with gynaecological cancer”.

Vísindastarvsfólk á Náttúruvísindadeildini hava gransking sum ein part av sínum starvi. Granskingin er partvís fíggjað av fíggjarlóg Setursins og partvís av øðrum almennum og/ella privatum samstarvspørtum.

Granskingin á Náttúruvísindadeildini verður framd innan mýlska lívfrøði, populatiónsgenetikk, vistfrøði, biotøkni, aldu- og streymviðurskifti við Føroyar, umhvørvisdálking, støddfrøði og kunningar- og samskiftistøkni. Ígjøgnum granskingina verður nýggj vitan í náttúruvísindum, tøknifrøði og støddfrøði framleidd og miðlað.

Náttúruvísindadeildin var við til at skipa fyri ráðstevnuni Nordforsk Network Closing Conference, 15.-20. mai 2012. Hetta var ein ráðstevna innan støddfrøði, sum varð hildin við Gjógv við 40 luttakarum.

Í 2011 kom Náttúruvísindadeildin við í eitt Nordic Centre of Excellence við heitinum "Study of climate change effects on marine ecosystems and resource economics". Hetta er eitt 5 ára verkætlanarsamstarv millum tíggju norðurlendsk universitet og aðrar granskingarstovnar. Partur í hesum eru 16 ph.d. verkætlanir, harav ein varð sett í gongd á Náttúruvísindadeildini í 2012. Ph.d. verkætlanin hevur heitið "Spatial distribution of cod on the Faroe Plateau in relation to climate and other environmental conditions".

## Nýggjar samstarvsavtalur

### *Varandi orkukeldur*

Í september 2012 undirskrivaðu Sigurð í Jákupsstovu, rektari á Fróðskaparsetrinum, og Hans Hvidtfelt Larsen, varadekanur á DTU Nationallaboratoratoriet for Bæredygtig Energi, samstarvsavtalu um uppbygging av einum sterkum granskingarumhvørvi, sum skal granska, ráðgeva og geva hægri útbúgvingartilboð við atliti at framtíðar orkuskipanum í Føroyum. Avtalan sæst á www.setur.fo.

### *Heilsuvísindi*

Í desember 2012 undirskrivaðu Allan Flyvbjerg, dekanur á Faculty of Health, Århus Universitet, og Hans  Pauli Joensen, dekanur á Megindeildini fyri náttúru- og heilsuvísindi rammuavtalu fyri samstarvi innan heilsuvísindi. Avtalan hevur heitið "Agreement on international collaboration between Faculty of Health, Aarhus University and Faculty of Natural and Health Science, University of the Faroe Islands", og sæst á www.setur.fo.

# Útbúgvingar og lesandi

## *Útbúgvingar*

Í talvu 1 síggjast útbúgvingarnar, sum vórðu bodnar út í 2012. Allar útbúgvingarnar eru skipaðar eftir altjóða leisti og geva atgongd til víðari lestur uttanlands.

Talva 1: yvirlit yvir útbúgvingar, ið vórðu bodnar út á Fróðskaparsetrinum í 2012 (bachelor, master og hjánám).

| | | |
|---|---|---|
| **Lærara** | B.Ed. | 4 ára nám – starvsvenjing er partur av lestrinum |
| **Námsfrøði** | B.Ed. | 4 ára nám – starvsvenjing er partur av lestrinum |
| **Sjúkrarøktarfrøði** | B.Sc.Cur. | 4 ára nám – starvsvenjing er partur av lestrinum |
| **Søga** | B.A. | 3 ára nám við samlestri fyrsta árið |
| **Samfelagsfrøði** | B.S.Sc. | 3 ára nám við samlestri fyrsta árið |
| **Stjórnmálafrøði** | B.S.Sc. | 3 ára nám við samlestri fyrsta árið |
| **Lívfrøði** | B.Sc. | 3 ára nám |
| **Jarð- og Havfrøði*** | B.Sc. | Umskipað í 2012 til B.Sc. í orku og umhvørvisverkfrøði |
| **KT-verkfrøði** | B.Sc. | 3 ára nám, samstarv við MITT universitetet í Svøríki |
| **Mál og bókmentir** | B.A., M.A. og hjánám | Undirvísing í føroyskum máli og bókmentum á øllum stigum |

Kelda: Próvbókin, Fróðskaparsetur Føroya.

*Orsakað av ov fáum umsøkjarum, varð ikki tikið inn á Jarð- og havfrøði í 2012. Farið varð undir at endurskoðað útbúgvingina, sum seinni bleiv til Orku- og umhvørvisverkfrøði.

Afturat fulltíðarútbúgvingunum er nógv annað útbúgvingarvirksemi á Setrinum. Á skeiðum, sum ikki eru fullsett, kunnu fólk, sum hava neyðugu fortreytirnar, tekna seg sum stakgreinalesandi.

Í 2012 var sum undanfarin ár møguligt at lesa stakgreinalestur í løgfrøði á bachelor- og masterstigi. Samstundis vórðu fyrireikingar gjørdar til at skipa tvey ára masternám í løgfrøði.

Harumframt vóru ískoyti til bachelor veitt lesandi við eldri útbúgvingum til sjúkrarøktarfrøðing og lærara.

Í 2012 tóku nøkur lesandi diplomprógv innan almenna fyrisiting.

Altjóða summarskeið í føroyskum var í august mánað. Setrið bjóðar eisini á hvørjum ári onnur skeið, eitt nú Cambridgeskeið í enskum og Próvskeið í føroyskum.

Í 2012 varð útbúgvingin Joint Nordic Master (The Joint Nordic Master Programme in Marine Ecosystems and Climate) boðin út á Setrinum. Hendan útbúgvingin verður veitt av fleiri norðurlendskum universitetum í felag. Lesandi, sum fara undir hesa útbúgvingina, ferðast tí ímillum universitetini í samstarvinum at taka ásettu partarnar.

## *Lesandi 2012*

Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu tey lesandi á Fróðskaparsetrinum eru býtt á útbúgvingar. Nógv flest lesandi eru á NÁD, ið hvørt ár tekur inn stórar árgangir á báðum útbúgvingunum. Eisini SFD tekur eitt støðugt høgt tal av nýggjum lesandi inn á hvørjum ári. Talvan vísir, at fleiri aðrar útbúgvingar eisini eru vælumtóktar og draga at sær nógv lesandi.

Talið av lesandi á Fróðskaparsetrinum er støðugt vaksið seinastu árini. Frá 2008 til 2012 vaks samlaða talið við 111 lesandi, frá í 2008 at vera 462 lesandi til í 2012 at seta nýtt met, tá í alt 573 fólk vóru undir lestri á Fróðskaparsetrinum.

Av teimum lesandi á Fróðskaparsetrinum eru meira enn tveir triðingar kvinnur. Tað eru serliga útbúgvingarnar á NÁD og á SFD, ið hava nógv kvinnulig lesandi. Á NVD er meirilutin av teimum lesandi menn, ímeðan kynsbýti ímillum lesandi á SFD og á FMD er javnari.

Talva 2: Yvirlit yvir øll lesandi á Fróðskaparsetrinum í 2012, býtt á útbúgvingar.

| Útbúgvingar | Stytt heiti | Tal av lesandi |
|---|---|---|
| **Lærari** | B.Ed. | 139 |
| **Námsfrøði** | B.Ed. | 120 |
| **Mál og bókmentir** | B.A. | 48 |
| **Mál og bókmentir** | M.A. | 6 |
| **Søga** | B.A. | 30 |
| **Stjórnmálafrøði** | B.S.Sc. | 14 |
| **Samfelagsfrøði** | B.S.Sc. | 50 |
| **Lívfrøði** | B.Sc. | 14 |
| **KT-verkfrøði** | B.Sc. | 54 |
| **Jarð- og Havfrøði** | B.Sc. | 1 |
| **Sjúkrarøktarfrøði** | B.Sc.Cur. | 88 |
| **Almannafyrisiting** | Diplom | 2 |
| **Føroyskt** | Hjánám | 2 |
| **Søga** | Hjánám | 2 |
| **Søga** | M.A. | 2 |
| **Lívfrøði** | M.A. | 1 |
| **Lesandi tilsamans** | | **573** |

Kelda: Próvbókin, Fróðskaparsetur Føroya.

# Fíggjarviðurskifti

Talva 3: Roknskapur fyri Fróðskaparsetrið 2012.

| **Inntøkur** | **2012** | **2011** | **2010** |
|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan frá Løgtinginum | 68.797.000 | 68.047.000 | 65.498.000 |
| Søluinntøkur v.m. | 1.229.922 | 1.248.239 | 2.779.373 |
| Flytingarinntøkur millum almennar stovnar | 673.736 | 1.439.674 | 1.353.882 |
| Flytingarinntøkur frá kommunum | 1.746.713 | 1.639.594 | 1.580.286 |
| **Inntøkur til samans** | **72.447.371** | **72.374.507** | **71.211.541** |
| **Lønarútreiðslur til starvsfólk** | | | |
| Mánaðarlønir | 42.678.548 | 41.095.839 | 40.554.966 |
| Tímalønir | 3.805.232 | 2.869.909 | 2.651.960 |
| Samsýningar v.m. | 2.462.148 | 2.303.527 | 3.247.859 |
| Eftirlønir og AM-gjøld | 7.946.421 | 7.279.618 | 7.271.213 |
| Endurgjald fyri lønir | -48.651 | 616.975 | -566.551 |
| **Lønarútreiðslur til samans** | **56.843.698** | **54.165.868** | **53.159.447** |
| **Húsaleiga v.m.** | | | |
| Húsaleiga og viðlíkahald | 2.471.839 | 2.394.371 | 2.290.067 |
| El | 813.838 | 899.660 | 761.385 |
| Olja | 1.657.057 | 1.365.058 | 1.246.134 |
| **Húsaleiga v.m. til samans** | **4.942.734** | **4.659.089** | **4.297.586** |
| **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | | |
| Skrivstovuhald v.m. | 6.316.293 | 7.466.562 | 7.203.652 |
| Umboðan | 722.096 | 507.698 | 431.657 |
| Ferðing og flutningur v.m. | 1.708.627 | 2.005.456 | 1.639.370 |
| Keyp av útbúnaði | 1.403.422 | 2.586.030 | 3.233.561 |
| Stuðul | 176.397 | 141.000 | 389.000 |
| Aðrar rakstarútreiðslur | 52.308 | 581.500 | 724.067 |
| **Aðrar rakstrarútreiðslur til samans** | **10.379.143** | **13.288.246** | **13.621.307** |
| **Útreiðslur til samans** | **72.165.575** | **72.113.203** | **71.078.340** |
| **Avlop** | **281.796** | **261.304** | **133.201** |

Kelda: Fíggjardeildin, Fróðskaparsetur Føroya.

# Mál fyri 2013 og strategi

Í 2012 varð farið undir at orða ein avrikssáttmála ímillum leiðsluna og stýrið fyri árini 2013-2016, eins og sjøtil varð settur á arbeiðið við at orða eina strategi fyri langtíðarmenningina av Fróðskaparsetrinum.

Málini, sum leiðslan setti sær fyri at arbeiða fram ímóti í 2013, vóru hesi:

## *Leiðsla*

a) Strategi og avrikssáttmáli skulu evnast til og viðgerast millum starvsfólk á Setrinum og í stýrinum

b) Fleiri samstarvsavtalur skulu gerast við onnur universitet

c) Ein bólkur skal setast at gera eitt uppskot um framtíðar universitetskampus

## *Fyrisiting*

a) Fyrisitingin skal mennast, soleiðis at hon kann átaka sær uppgávur, ið standast av vaksandi virksemi og øktum krøvum til skjalfesting av útbúgvingardygd

b) Fróðskaparsetrið skal fyrireika seg til, at uttanhýsis serfrøðingar eftirmeta virksemið

c) Framkomið kt-kervi skal setast á stovn

d) Hagtalsgrundarlagið undir virkseminum skal betrast

## *Gransking*

a) Yvirlit skal gerast yvir vísindaligu framleiðsluna

b) Ársætlanir fyri vísindafólk/undirvísarar skulu ásetast

## *Útbúgving*

Nýggjar útbúgvingar, sum skulu setast á stovn:

- Master í løgfrøði
- Master í vegleiðing[1]
- Bachelor í orku- og umhvørvisverkfrøði

## *Lesandi og lestrarumhvørvi*

a) Ráð teirra lesandi skal skipast

b) Samskipað lestrarvegleiðing skal skipast

c) Umstøðurnar fyri felags virksemi skulu mennast

[1] Útbúgving í vegleiðing er komin í lag eftir áheitan frá vegleiðaraumhvørvinum í Føroyum og í samstarvi við Háskóla Íslands. Mentamálaráðið ber ein part av kostnaðinum.

# Leiðsla og stýri

## Leiðsla

- Sigurð í Jákupsstovu, rektari, cand.polyt., ph.d.
- Hans Pauli Joensen, dekanur á Megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi, cand.scient og lektari
- Malan Marnersdóttir, dekanur á Megindeildini fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi, cand.mag, dr.phil og professari í bókmentum
- Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri, cand.mag.

## Stýrið við ársenda 2012

- Herálvur Joensen, stýrisformaður, stjóri í Føroya Reiðarafelag
- Jan Mortensen, næstformaður, privatkundastjóri á Føroya Tele
- Juanna Schröter Joensen, lektari við lærda háskúlan í Stockholm
- Tove Bull, professari í málfrøði við lærda háskúlan í Tromsø
- Gestur Hovgaard, lektari á Søgu- og Samfelagsdeildini
- Sára Joensen, skrivari á Føroyamálsdeildini
- Birna Gaard, lesandi á Námsvísindadeildini

# Vísindaligar útgávur

## Javnlíkamettar (Peer reviewed)

Vísindaligar bøkur og javnlíkarmettar greinir í tíðarritum og bókum:

1. Arklint, S., **Restorff, G.** & Ruiz, E. (2012). Filtrated K-theory for real rank zero C*-algebras. *International Journal of Mathematics,* 23 (8), (electronic version) 19 pages.

2. **Christiansen, Ó.** (2012). The Literature Review in Classic Grounded Theory Studies. In J. A. Holton & B. G. Glaser (Eds.), *The Grounded Theory Review Methodology Reader: Selected Papers 2004-2011* (pp. 197-200). Mill Valley, CA: Sociology Press.

3. **Christiansen, Ó.** (2012). A Simpler Understanding of Classic GT and how it is a Fundamentally Different Methodology. In J. A. Holton & B. G. Glaser (Eds.), *The Grounded Theory Review Methodology Reader: Selected Papers 2004-2011* (pp. 61-84). Mill Valley, CA: Sociology Press.

4. **Christiansen, Ó.** (2012). The Rationale for the Use of Classic GT. In J. A. Holton & B. G. Glaser (Eds.), *The Grounded Theory Review Methodology Reader: Selected Papers 2004-2011* (pp. 85-104). Mill Valley, CA: Sociology Press.

5. Feng, W., Cao, J. & **Xin, Q.** (2012). Coordination of Multi-link Spectrum Handoff in Multi-radio Multi-hop Cognitive Networks. *Journal of Parallel and Distributed Computing*, 72 (4), 613-625. (http://dx.doi.org/10.1016/j.jpdc.2011.11.004).

6. Heycock, C., Sorace, A., **Hansen, Z. S.**, Wilson, F. & Vikner, S. (2012). Detecting the late stages of syntactic change: The loss of V-to-T in Faroese. *Language*, 88, 3, 558-600.

7. Huang, J., Hu, W., **Xin, Q.** & Du, X. (2012). An object Correlation and Maneuver Detection Approach for Space Surveillance. *Research in Astronomy and Astrophysics*, Vol. 12 (10), 1402–1416. (http://iopscience.iop.org/1674-4527/12/10/003).

8. Huang, J., Hu, W., Ghogho, M., **Xin, Q.**, Du, X. & Guo, W. (2012). A novel signal processing approach for LEO space debris based on a fence-type space surveillance radar system. *Advances in Space Research*, Vol. 50 (11), 1462–1472. (http://dx.doi.org/10.1016/j.asr.2012.07.020)

9. Huang, J., Hu, W., **Xin, Q.** & Guo, W. (2012). A novel data association scheme for LEO space debris surveillance based on a double fence radar system. *Advances in Space Research*, Vol. 50 (11), 1451–1461. (http://dx.doi.org/10.1016/j.asr.2012.07.019)

10. Kolbeinshavn, A.G., Vestergaard, P., Patursson, Ø. & **Gislason, H.** (2012). Rapid growth of farmed cod in sea cages in the Faroe Islands. *Aquaculture*, Vol. 358–359, 224-233.

11. **Jacobsen, J. í Lon (**2012**).** Ærligt talt, who cares? Um doktaraverjuna á universitetinum í Bergen Í J. G. Jørgensen og L. S. Vikør (ritstj.), *Mål og Minne (1)*, (pps.110-148). Oslo: Novus Forlag.

12. **Jacobsen, J. í Lon** (2012). Sproglig markedsøkonomi på Færøerne. *Fróðskaparrit* (59), 75-86. Tórshavn: Fróðskapur.

13. **Jacobsen, J. í Lon**. (2012). *Ærligt talt, who cares. En sociolingvistisk undersøgelse af holdninger til og brug af importord og afløsningsord i færøsk*. Moderne importord i språka i Norden (Nr. XIII). Oslo: Novus Forlag.

14. **Johansen, A.** (2012). Färöarna. Í *Namn och bygd - Tidskrift för nordisk ortnamnforskning 2011* (100), *Litteraturkrönika* (p. 311). Uppsala: Kungl. Gustav Adolfs Akademien för svensk folkkultur.

15. **Marnersdóttir, M**. (2012). William Heinesen in Faroese. Í K. J. L. Knudsen et al. (ritstj.), *Language policy challenges of the future,* (pps. 23-35). Oslo: Novus Press.

16. **Marnersdóttir, M**. (2012). Bókmentir og samfelag. Færøysk liv i nordisk perspektiv. Í E. Bugge et al. (ritstj.), *Heiðursrit til Beintu í Jákupsstovu* (pps. 135-150). Tórshavn: Fróðskapur.

17. **Miðskarð, J.** (2012). Action and thinking. An investigation of how social workers' consulting sessions influence school professionals' further perspectives on issues in vulnerable children's lifeworlds. Roskilde: Ph.d.-ritgerð, Institut for Psykologi og Uddannelsesforskning, Roskilde Universitet.

18. **Petersen, H.** & Heycock, C. (2012). Pseudo-coordinations in Faroese. In K. Braunmuller & C. Gabriel (Eds.). *Multilingual Individuals and Multilingual Societies* (pps. 259-280). Amsterdam: John Benjamins.

19. **Sølvará, H.A.** (2012). *Tey fyrstu jólini.* Tórshavn: Fróðskapur.

20. **Sølvará, H.A.** (2012). Tilboðið, Alberti og danska stjórnin – ein søga um eina politiska mytu. *Fróðskaparrit* (59), 20-39. Tórshavn: Fróðskapur.

21. **Sølvará, H.A.** (2012). Moyggj skal vera við barn ... - nøkur orð um bíbliutýðingar og bíbliutulkingar. *Fróðskaparrit* (59), 40-62. Tórshavn: Fróðskapur.

22. **Sølvará, H.A.** (2012). En særlig færøsk religionhistorie i nordisk-dansk perspektiv. *Kirkehistoriske Samlinger 2012,* 220-235. København, Selskabet for Danmarks Kirkehistorie.

23. Thráinsson, H., **Petersen, H.P., Jacobsen, J. í Lon** & **Hansen, Z.S.** (2012). *Faroese. An Overview and Reference Grammar* (2. ed.). Fróðskapur/Málvísindastofnun Háskóla Íslands, Tórshavn & Reykjavík.

24. Wei, C., **Xin, Q.**, Chung, W., Liu, S., Tam, H.Y. & Ho, S.L. (2012). Real-time Train Wheel Condition Monitoring by Fiber Bragg Grating *Sensors. International Journal of Distributed Sensor Networks*, Article ID 409048, 7 pages (doi:10.1155/2012/409048).

25. **Xin, Q.**, Manne, F., Zhang, Y. & Wang, X. (2012). Almost Optimal Distributed M2M Multicasting in Wireless Mesh Networks. *Theoretical Computer Science*, Vol. 439, 69-82. http://dx.doi.org/10.1016/j.tcs.2012.03.015

26. Zhang, Z., Wang, X. & **Xin, Q.** (2012). A New Performance Metric for Construction of Robust and Efficient Wireless Backbone Network. *IEEE Transactions on Computers*, Vol. 61 (10), 1495-1506. (http://doi.ieeecomputersociety.org/10.1109/TC.2011.185).

## Aðrar vísindaligar útgávur (Other scientific publications)

Ritstjórnaðar greinir í øðrum miðlum eitt nú í heiðursritum, fak- og mentatíðarritum, frágreiðingar frá kanningum v.m.:

27. **Andreassen, E.** (2012). Ein undarlig søga – Metaforur og symbol í einum ævintýri. Í E. Andreassen et al. (ritstj.) *Malunarmót*. *Heiðursrit til Maluna Marnersdóttur*, (pps. 15-24). Tórshavn: Fróðskapur.

28. **Gaini, F.** (2012). En sømand går i land. *Jordens Folk* (1-2012). Keypmannahavn: Dansk Etnografisk Forening.

29. Glenn, H., Tingley, D., Maroño, S.S., **Holm, D.**, Kell, L., Padda, G., Edvardsson, I.R., Asmundsson, J., Conides, A., Kapiris, K., Bezabih, M., Wattage, P. & Kuikka, S. (2012): Trust in the fisheries scientific community, Marine Policy, Vol. 36, Nr. 1, 54-72.

30. **Hansen, B.D.** (2012). Orðdeyvur Goethetróndur. Í E. Andreassen, M. Johannesen, A. Johansen & T. Sigurðardóttir (ritstj.) *Malunarmót*. *Heiðursrit til Maluna Marnersdóttur*, (pps. 77-85). Tórshavn: Fróðskapur.

31. **Hansen, H.H.** (2012). Aftursvar. Ein yrkislig mynd av teimum lærarum, ið tóku prógv á Føroya Læraraskúla frá 2007 til 2011. Frágreiðing frá spurnarkanning. Tórshavn.

32. **Holm, D.** (2012). Førleikamenning og arbeiðsmegi - tørvurin hjá føroyskum fyritøkum, Arbeiðsrit 29/2012. Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. Fróðskaparsetur Føroya.

33. **Holm, D.**, Vilhelm, B., & Justinussen, I., (2012). BMI hjá børnum í 1. og 7. flokki í Føroyum, Arbeiðsrit 30/2012. Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. Fróðskaparsetur Føroya.

34. **Holm, D.** & Olsen, H. (2012). Fiskastovnar, æti og fiskidagar 2012 - Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn og -kvinnur. *Fiskidaganevndin* (samrøðukanning).

35. **Holm, D.** (2012). Lærings- og inspirationsnetværk for aktive 'ildsjæle' i 4 nordiske lokalsamfund i udkantsområder. Í K. Vestergaard-Poulsen & K. Vestergaard-Poulsen (ritstj.), *Lærings- og inspirationsnetværk for aktive 'ildsjæle' i 4 nordiske lokalsamfund i udkantsområder* (pps. 9-106). Nordisk Ministerråd, Nordplus.

36. **Johansen, A.** (2012). Okkurt smávegis um faðirsnøvn. Í E. Andreassen et al. (ritstj.) *Malunarmót*. *Heiðursrit til Maluna Marnersdóttur*, (pps. 204-213). Tórshavn: Fróðskapur.

37. **Jacobsen, J. í Lon** (2012). Hví tosa vit viðhvørt – og snakka viðhvørt? – um málvariatión í føroyskum. Í E. Andreassen et al. (ritstj.) *Malunarmót*. *Heiðursrit til Maluna Marnersdóttur*, (pps. 124-142) . Tórshavn: Fróðskapur.

38. **Magnussen, K.** (2012). Gøtunøvn sum minnisvarðar. Í E. Andreassen et al. (ritstj.) *Malunarmót*. *Heiðursrit til Maluna Marnersdóttur*, (pps. 312-325).Tórshavn: Fróðskapur.

39. **Miðskarð, J.** (2012). Avbjóðingar fyri námsfrøðingar og hjálparfólk – við serligum atliti til øðrvísi útbúnar limir og tvørprofessionelt samstarv. Tórshavn: Føroya Pedagogfelag. Tikið niður 08.01.14 av http://www.pedagogfelag.fo/sysmappper/avbjodingar-hja-namsfroedingum-og-hjalparfolkun/?L=0

40. **Mikalsen, S.O. and Magnussen, E.** (2012*).* Nordmarine Meeting - University of the Arctic An educational co-operation among universities in the Arctic region and the formation of the thematic network "Northern fisheries". *NVDRit* (2012:01), 1-29, University of the Faroe Islands.

41. **Niclasen, B.A. & Simonsen, K.** (2012). High resolution wave climate of the Faroe Islands. *NVDRit* (2012:03), 1-58, University of the Faroe Islands.

42. **Niclasen, B.A.** (2012). Technical information related to hindcast forced wave climate estimation for the Faroe Islands ano 2012. *NVDRit* (2012:06), 1-30, University of the Faroe Islands.

43. **Petersen, H.P.** (2012). Føroyskt-danskt málamót. Prosessir og úrslit. *Frændafundur (7)*, 127-145. Reykjavík, Iceland.

44. **Petersen, H.P.** (2012). Orðmyndan í føroyskum. *Varðin 79*, 46-67.

45. **Sigurðardóttir, T.** (2012). Løtan loftað. Yrkjarin Hjørdis Djurhuus. Í E. Andreassen et al. (ritstj.) *Malunarmót*. *Heiðursrit til Maluna Marnersdóttur*, (pps. 398-409).Tórshavn: Fróðskapur.

46. **Sølvará, H.A.** (2012). Gudfrøðistreymar og trúarligar vekingarrørslur í Føroyum og Íslandi. *Frændafundur* (7), 207-231. Reykjavík, Iceland.

47. **Weyhe, E.** (2012). *Eivindaródn*. Greinar 1979-2011. Í E. Weyhe og A. Johansen (ritstj.). *Heiðursrit til Eivind Weyhe á sjútiára degnum 25. apríl 2012*. Tórshavn: Fróðskapur.

## Ráðstevnur (Conferences)

Framløgur á ráðstevnum eftir at úrtak hevur verið mett og góðkent:

48. Feng, W., Liu, J., Cao, J., Yang, L., & **Xin, Q.** (2012). *Estimating Available Bandwidth in Cooperative Multi-hop Wireless Networks*. Invited Paper, in proceedings of the 9th IFIP

International Conference on Network and Parallel Computing, IFIP NPC 2012. (Best Paper Award). Gwangju, Korea, 6th - 8th of September.

49. **Hovgaard, G.** and Jákupsstovu, B. í (2012). *Born: In a semi-sovereign microstate. National identity: Multiple.* Perceptions on Economy, Security and Identity in an Increasingly Regionalized World. Third International Workshop: Identity. Nordic and Baltic Small States (NBSS). Vilnius, 5th of October.

50. **Hovgaard, G.** (2012). *Commuting, Migration and Changing Identities: Mobility trends in the Faroe Islands*. Workshop: The Global Periphery. Aalborg University – Skagen, 4th to 7th of December.

51. **Hovgaard, G.** and Bærentsen, J. (2012). *Dynamics of mobility – movement trends in the Faroe Islands. Gendered geographical mobility and quantitative data: A pilot study in Faroe Island, Iceland and North Norway.* Workshop: Existing statistical and quantitative data as a basis for a joint Nordic study on gender and mobility. Reykjavík, 11th and 12th of September.

52. **Hovgaard, G.** (2012). *Geographical Information Systems*. Nordic Workshop, supported by Nordic Regional Association (NORA). Project leader. Tórshavn, 22nd – 24th of May.

53. **Hovgaard, G.** (2012). *Innovation Boot-Camp*. Main activity in the Nordic Innovation Marine Marketing Programme (NIMMP), which is a joint venture of Innovit Entrepreneurship centre in Iceland, University of Faroe Islands, Stardust CBS in Denmark, Norwegian University of Life Sciences, Swedish University of Agricultural Science and Nordic Innovation. Project leader. Tórshavn, 1st – 4th of November.

54. Li, M., Wang, Y., Jin, S., Xie, P. & **Xin, Q.** (2012). *ReverPS: Revese Extraction of Protocol Specification from Network Applications.* In proceedings of the 7th International Conference on Frontier of Computer Science and Technology, FCST 2012. Suzhou, China, 21st – 23rd of November.

55. **Marnersdóttir, M.** (2012). "*Lov og retsvæsen i William Heinesens roman Det gode håb*". The 29th Study Conference of the IASS (International Association for Scandinavian Studies) Literature and Law. University of Latvia & University of Daugavpils, Latvia, 7.- 11. august.

56. **Miðskarð, J.** (2012). *Tværprofessionelt samarbejde*. Ráðstevna: "Barndom under forandring – perspektiver på barnet i familien og institutionen". Nuuk, Grønland, 10.- 12. mai.

57. **Petersen, U.K., Brown, R.J.** & Andersen, M.S. (2012). *Variations in seismic properties of flood basalts from shallow refraction seismic analysis.* Submitted for presentation at 74th EAGE Conference& Exhibition (ExtendedAbstracts), Copenhagen, Denmark.

58. **Róin, Á.** (2012, June). *Ageing in the Faroe Islands; A small state perspective*. Nordisk Gerontologisk Kongres. Copenhagen, Denmark.

59. **Róin, Á.** (2012, September). *Disclaiming and assuming responsibility: a discourse analysis of older women's attitudes and strategies for coping with urine incontinence in their daily living*. ESA Research Network, 20 Midterm Conference, Lund, Sweden.

60. **Sølvará, H.A.** (2012). "The Faroese welfare system in historical context". NORA ráðstevna í Reykjavík, Ísland, 7. november.

61. Wei, C., Zhuang, Z., Shamma, A. & **Xin, Q.** (2012). *Harmful exhaust emissions monitoring of road vehicle engine*. In the proceedings of the 5th International Conference on Intelligent Computation Technology and Automation, ICICTA. Zhangjiajie, Hunan, China, 12th – 14th of January.

62. Zhang, Z., Li, Z., **Xin, Q.**, Xiao, D. & He, W. (2012). *Super-Fast Multipole Method and Distortion Analysis of Passive Sensor Probes for the Measurements in Electric Fields*. In proceedings of the International Conference on Information, Computing and Telecommunications, ICICT. Harbin, China, 7th – 8th of January.

# Ph.d. verkætlanir á Fróðskaparsetrinum í 2012

| Heiti á verkætlan | Lesandi | Høvuðsvegleiðari |
|---|---|---|
| **The effects of climate and ocean currents on Faroe saithe** | Eydna í Homrum | Bogi Hansen, adjung. professari |
| **Vatngóðska innan aling á sjónum** | Heini Winthereig Rasmussen | Knud Simonsen, lektari |
| **Føroysk gøtunøvn – ein partur av føroysku staðarnøvnunum** | Kristin Marjun Magnussen | Eivind Weyhe, lektari |
| **Proteoglycans (PGs), glycosaminoglycans (GAGs) and collagen in the connective tissue of fish muscle** | Ása Jacobsen | Svein-Ole Mikalsen, professari |
| **Bioactive peptides - extraction and processing methods for marine secondary** | Durita Dahl Djurhuus | Svein-Ole Mikalsen, professari |
| **Spatial distribution of cod on the Faroe Plateau in relation to climate and other environmental conditions** | Katharina Maj Ottesen | Eyðfinn Magnussen, lektari |
| **Time and Energy Efficient Communication in Wireless Sensor Networks** | Guoqiang (Richard) Liu | Xin Qin, lektari |
| **Processing and geologic interpretation of reflection-seismic data from the Glyvursnes-Vestmanna seismic tie** | Hilmar Simonsen | Jim Brown, professari |
| **Improved techniques for processing reflection-seismic data from the Glyvursnes-Vestmanna seismic tie** | Khanh Duc Nguyen | Jim Brown, professari |
| **Heima er ikki til - ferðafrásagnir K. O. Viderøs** | Bergur D. Hansen | Malan Marnersdóttir, professari |
| **Máltøka hjá føroyskum børnum** | Sissal Rasmussen | Dorthe Bleses, professari, Syddansk Universitet |
| **Leaving the islands: Understanding Women´s Migration from the Faroe Islands** | Karin Johanna Knudsen | Jørgen Ole Bærenholdt, professari, RUC og Malan Marnersdóttir, professari |
| **Málslig menning og lesimenning/undirvísing hjá føroyskum børnum** | Karolina Matras | Niels Egelund, professari, Aarhus Universitet |
| **Ageing in the Faroe Islands. The construction of old age and the experience of ageing** | Ása Róin | Catharina Nord, lektari og Elisabet Cedersund, professari, Linköpings Universitet |